# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 11.01.2019
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um Virkisskrá**

## Uppskot til

## Løgtingslóg
## um
## Virkisskrá

*Virkisøki*

**§ 1.** Landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av at umsita KT-skipan við skrá við grundardátum um eindir í Føroyum, í hesi lóg nevnd Virkisskráin.

**§ 2.** Virkisskráin skal:

1) innihalda grundardátur um løgfrøðiligar eindir, sbrt. § 3, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir, sbrt. § 4.
2) tilluta skrásettu løgfrøðiligu eindunum, framleiðslueindunum og undirframleiðslueindunum eintýðugt eyðmerkingartal, sbrt. §§ 5 og 6, og
3) gera grundardátur tøkar, sbrt. §§ 15 og 16.

*Allýsingar*

**§ 3.** Ein løgfrøðilig eind skal í hesi lóg skiljast sum:
1) Ein likamligur persónur sum er sjálvstøðugt vinnurekandi og hevur ein umsetning yvir 30.000 kr. ella sum er arbeiðsgevari.
2) Ein løgfrøðiligur persónur ella deild undir útlendskum løgfrøðiligum persóni.
3) Stjórnarráð og stovnur undir hesum, umframt
- serligur grunnur o.a., so sum arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Búnaðargrunnurin, Frítíðargrunnurin, Granskingargrunnurin, Húsalánsgrunnurin, Mentanargrunnur Landsins, trygdargrunnur fyri avreiðingar og lønir og Vinnuframagrunn o.l.
- sjálvsognarstovnur, ið er á fíggjarlógini javnbjóðis teimum rættiligu landsstovnunum.
- Ríkisstovnur.
- Sendistova
4) Kommuna.
5) Kommunal samstørv.

**§ 4.** Ein framleiðslueind skal í hesi lóg skiljast sum:

1) Tað høvuðsvirksemi, ið framt verður av løgfrøðiligari eind, har alt virksemið verður framt á ella frá somu fysisku adressu sum adressan hjá løgfrøðiligu eindini.
2) Tað høvuðsvirksemi, ið er á hvørjari einstakari adressu, um ein løgfrøðilig eind hevur virksemi, ið framt verður á ella frá fleiri fysiskum adressum

*Stk. 2.* Ein undirframleiðslueind skal í hesi lóg skiljast sum: Hvørt einstakt virksemi, um ein framleiðslueind hevur fleiri virksemi, ið framd verða á ella frá somu fysiskari adressu.

*Eintýðug eyðmerking*

**§ 5.** Løgfrøðiligar eindir fáa tillutað eintýðugt eyðmerkingartal í Virkisskránni, V-tal.

**§ 6.** Framleiðslueindir fáa tillutað eitt eintýðugt eyðmerkingartal, F-tal, ið verður knýtt til V-talið fyri løgfrøðiligu eindina, ið tað hoyrir til.

*Stk. 2.* Undirframleiðslueindir fáa tillutað eitt eintýðugt eyðmerkingartal, UF-tal, ið verður knýtt til F-talið fyri framleiðslueindina, ið tað hoyrir til.

*Grundardátur úr øðrum skráum*

**§ 7.** Virkisskráin hevur heimild at heinta og útflýggja grundardátur úr skráum hjá TAKS og Skráseting Føroya, undir hesum eisini upplýsingar hesar skráir hava fingið úr fólkayvirlitinum.

*Stk. 2.* Virkisskráin hevur heimild at heinta og útflýggja grundardátur úr fólkayvirlitinum.

*Grundardátur í Virkisskránni*

**§ 8.** Fyri løgfrøðiligar eindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni:
1) V-tal.
2) Navn og hjánøvn.
3) Virkisháttur.
4) Byrjanardagfesting.
5) Møgulig uppathaldsdagfesting.
6) Adressa.
7) Navn, adressa og p-tal hjá stjórn.
8) Navn, adressa og p-tal hjá nevnd.
9) Grannskoðari.
10) Geiri.
11) Vinnugrein og møgulig hjávinnugrein.
12) Starvsfólkatal
13) F-tal fyri atknýttar framleiðslueindir.
14) Kontaktupplýsingar.
15) Møguligt skrásetingnummar.
16) Mvg-skylda

*Stk. 2.* Fyri framleiðslueindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni:
1) F-tal
2) V-tal, ið framleiðslueindin er knýtt at.
3) Navn ella nevni.
4) Byrjanardagfesting.
5) Møgulig uppathaldsdagfesting.
6) Adressa.
7) Navn, adressa og p-tal hjá stjórn.
8) Vinnugrein og møgulig hjávinnugrein.
9) Starvsfólkatal.
10) Kontaktupplýsingar.
11) UF-tal fyri atknýttar undirframleiðslueindir

*Stk. 3.* Fyri undirframleiðslueindir verða hesar grundardátur skrásettar í Virkisskránni:
1) UF-tal
2) F-tal, ið undirframleiðslueindin er knýtt at.
3) Navn ella nevni.
4) Byrjanardagfesting.
5) Møgulig uppathaldsdagfesting.
6) Adressa.
7) Navn, adressa og p-tal hjá stjórn.
8) Vinnugrein.
9) Starvsfólkatal.
10) Kontaktupplýsingar.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um at frítaka ávísar løgfrøðiligar eindir sbrt. § 3, nr. 2 heilt ella lutvíst frá, at grundardátur verða skrásettar og viðlíkahildnar í Virkisskránni.

*Viðlíkahald av grundardátum*

**§ 9.** Fyri løgfrøðiligar eindir, sum tilskilaðar í § 3, nr. 1, verða grundardátur í Virkisskránni viðlíkahildnar av TAKS.

*Stk. 2.* Fyri løgfrøðiligar eindir, sum tilskilaðar í § 3, nr. 2, verða grundardátur í Virkisskránni viðlíkahildnar av TAKS og Skráseting Føroya í felag.

*Stk. 3.* Fyri løgfrøðiligar eindir, sum tilskilaðar í § 3, nr. 3, 4 og 5, verða grundardátur í Virkisskránni viðlíkahildnar av Hagstovuni.

*Stk. 4.* Fyri framleiðsuleindir og undirframleiðslueindir, sum tilskilaðar í § 4, verða grundardátur í Virkisskránni viðlíkahildnar av Hagstovuni.

**§ 10.** Aðrir almennir stovnar enn teir nevndu í § 9, kunnu eftir avtalu við ábyrgdara av viðlíkahaldi, sbrt. § 9, og umsitara av Virkisskránni, viðlíkahalda grundardátur um løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir í Virkisskránni.

**§ 11.** Skráseting av løgfrøðiligum eindum, sbrt. § 3, fer fram hjá rætta myndugleika, men sjálvgreiðsla til at skráseta eindir, broyta grundardátur um eindir og at strika grundardátur um eindir, kann fara fram umvegis Virkisskránna, um hetta annars ikki stríðir við galdandi lóggávu á økinum.

*Krøv til almennar stovnar*

**§ 12.** Almennir stovnar skulu í øllum viðurskiftum tá ið umræður løgfrøðiligu eindina nýta V-talið, sbrt. § 5, og í øllum viðurskiftum, tá ið umræður framleiðslueindina nýta F-talið, sbrt. § 6, stk. 1.

**§ 13.** Almennir stovnar skulu heinta grundardátur, sbrt. § 8, úr Virkisskránni.

*Fráboðan av grundardátum*

**§ 14.** Løgfrøðiligar eindir, sbrt. § 3, skulu lata og dagføra grundardátur, sbrt. § 8, stk. 1-2, til Virkisskránna, um hetta ikki er álagt í aðrari lóggávu.

*Stk. 2.* Løgfrøðiligar eindir, sbrt. § 3, skulu eftir áheitan frá Hagstovuni fráboða hvørja einstaka undirframleiðslueind, samsvarandi § 4, stk. 2, innan eina av Hagstovuni ásetta freist.

*Atgongd til grundardátur*

**§ 15.** Øll kunnu fáa útflýggjað grundardátur úr Virkisskránni, tó við teim undantøkum og treytum nevndar í stk. 2-4 ella í aðrari lóggávu.

*Stk. 2.* P-tøl skulu ikki útflýggjast úr Virkisskránni.

*Stk. 3.* Dagføring av persónsupplýsingum sbrt. § 8, stk.1, nr. 7 og 8 og § 8, stk. 2, nr. 7, steðgar 10 ár eftir, at viðkomandi persónur gerst óvirkin í eindum, skrásettar í Virkisskránni.

*Stk. 4.* Grundardátur um tal av starvsfólki skulu bert í støddarbólkum útflýggjast til privat.

*Stk. 5.* Almennir stovnar, ið hava fingið grundardátur úr Virkisskránni, skulu í samband við víðarigeving av hesum lúka ásetingar í stk. 2 og 4 og § 16, stk. 2.

*Lýsingarvernd*

**§ 16.** Við fráboðan kunnu løgfrøðiligar eindir tilskila sær lýsingarvernd. Tað merkir, at uttan nágreiniliga heimild í lóg, í reglum við heimild í lóg ella samtykki, kunnu grundardátur um viðkomandi eind í Virkisskránni ikki nýtast í samband við marknaðarføring

*Stk. 2.* Grundardátur, ið eru móttiknar við frámerki um lýsingarvernd, skulu ikki nýtast ella víðarigevast í stríð við stk. 1.

*Revsing*

**§ 17.** Tann, ið tilætlað ella av grovum ósketni brýtur ásetingina í § 16, stk. 2, sektast við bót.

*Stk. 2.* Løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært kapittul 5 í revsilógini.

*Ígildiskoma*

**§ 18.** Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nær henda løgtingslóg kemur í

gildi, undir hesum at ásetingar í hesi løgtingslóg fáa ymiska gildiskomu, tó undantikið stk. 2.
*Stk. 2.* § 7 kemur í gildi dagin eftir, at henda løgtingslóg er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Hetta lógaruppskot er partur av Talgildu Føroyum.
Talgildu Føroyar verkætlanin byggir á 4 grundsúlur, ið samanlagt vilja skapa eitt nýtt og framkomið talgilt undirstøðukervi í Føroyum. Súlurnar eru: Talgildi Samleikin, Heldin (felags talgildur samskiftisvegur), Borgaraportalur og Grunddátur. Hetta lógaruppskotið er partur av súluni Grunddátur.

Í verkætlanini Talgildu Føroyar eru grundardátur ein av hornasteinunum. Tað umfatar grundardátur um virkir, stovnar, felagsskapir og aðrar fyrisitingarligar eindir í Føroyum (saman kallað eindir).

Grundardátur eru grundleggjandi upplýsingar, ið verða nýttar av flest øllum almennum myndugleikum, borgarum og virkjum.

Grundardátu-verkætlanin hevur sum yvirskipað endamál at tryggja eina skynsama nýtslu av grundardátum í føroyska samfelagnum við at tryggja, at hesar eru tøkar, álítandi og ókeypis.

Skynsom nýtsla av almennum grundardátum er týðandi fortreyt fyri skynsamari rakstri, betri tænastu og øktum vinnumøguleikum, bæði í tí almenna og tí privata geiranum.

Í Føroyum finst eingin almenn skrá við grundardátum um eindir, sum eintýðugt eyðmerkir føroyskar eindir. TAKS hevur vinnuskránna, ið skrásetir føroysku eindirnar og har lykilin, ið eyðmerkir, er V-talið. Skráseting Føroya skrásetir eisini ein part av eindunum, og har er lykilin partafelagsnummarið. Eingin ella lítil samskipan er av hesi innsavnan, og trupult er at samskifta og endurnýta somu grundardátur millum almennar stovnar og privatar eindir.

Við hesum lógaruppskoti er ætlanin, at almenn (autoritativ) skrá um eindir, nevnd Virkisskráin, verður sett í gildi í Føroyum.

<u>Tørvslýsing</u>
Tørvur er á einari almennari virkisskrá, sum undirstøði fyri øllum grundardátum um eindir í Føroyum, fyri at effektivisera útvegan av grundardátum til almennar og privatar eindir. Eisini er ein almenn virkisskrá neyðug fyri at fáa best gagn av “Talgildu Føroyar” verkætlanini, m.a. sum fortreyt fyri eintýðugari eyðmerking av eindum í “Talgilda Samleika” loysnini.

Flestu stovnar og virki, ið hava tørv á at halda skil á eindum í Føroyum, halda sína egnu skrá viðlíka, tó at summi í ávísan mun styðja seg til skránna hjá TAKS.

Hetta merkir, at neyðugt er við manuellum viðlíkahaldi, tá talan er um eindir, sum til dømis broyta navn, bústað ella telefonnummar ella verða stovnaðar, halda uppat, verða lagdar saman við øðrum ella verða umskipaðar. Í besta føri geva eindirnar boð um broytingina, í næstbesta føri fær viðkomandi myndugleiki ella virki boð um hetta, tá posturin ikki longur kemur fram til nakran móttakara.

Tí er mett neyðugt, at fáa eina almenna skrá, ið inniheldur allar grundardátur um eindir í Føroyum. Hetta verður almenna skráin, har allir upplýsingar um eindir eru at finna. Hendan skráin kann so viðlíkahalda grundleggjandi upplýsingar í miðfirraðu skráunum runt um landið, hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum o.fl.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Tað finst ikki lóggáva á økinum í dag.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógini, er at fáa eina almenna virkisskrá í Føroyum, ið skal tryggja, at:

- ongum, hvørki almennum stovnum ella privat virki, nýtist at hava sína egnu virkisskrá,
- allir almennir stovnar brúka felags virkisskrá og
- grundardátur altíð eru dagførdar.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Fyrimunir, við at gera almenna virkisskrá eru, at føroyska samfelagið fær:

- eina fullfíggjaða, álítandi virkisskrá, sum kann gagnnýtast av øllum
- ómakaleyst og ókeypis atgongd til grundardátur
- eina eintýðuga eyðmerking og bólking av eindum
- økt gjøgnumskygni
- betri hagtalsgrundarlag
- eliminera tørvin á manuellum dupult-skrásetingum
- lætt munandi um útveksling av grundardátum millum partar
- færri feilir og skeivar dátur
- tað hevur munandi effektiviseringar við sær, bæði fyrisitingarligar og tøkniligar, ið letur upp fyri nýggjum vinnumøguleikum við betri gagnnýtslu av grundardátum

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

[*Her verða hoyringssvar sett inn*]

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Hetta lógaruppskotið er karmurin um eina komandi Virkisskrá, sum umframt lógaruppskotið umfatar menning og rakstur av talgildari Virkisskrá. Alt hetta er aftur ein partur av grundardátuverkætlanini, sum er ein av súlunum í “Talgildu Føroyum” verkætlanini. Í verkætlanartíðarskeiðinum sum gongur fram til ár 2020 er hetta uppskotið fíggjað av játtanini til “Talgildu Føroyar”. Menning og rakstur av skipanini í verkætlanartíðarskeiðinum er leysliga mett til góðar 9 mió. kr.

Eftir ár 2020 verður leysliga mett, at tað skal 0,2 ársverk afturat á Gjaldstovuni, at umsita KT-skipanina, og 1 ársverk afturat á Hagstovuni, at viðlíkhalda grundardátur um framleiðslueindir. Fremjingin av talgildari Virkisskrá er ein av fortreytinum fyri gagninum av Talgildu Føroyar verkætlanini og skal tí roknast sum partur av hesum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað verður væntandi Gjaldstovan, sum fer at umsita Virkisskránna. Av tí at tað verða fleiri eindir, sum skulu skrásetast og at KT-skipanin skal viðlíkahaldast, verður mett, at hetta fer at krevja 0,2 ársverk afturat á Gjaldstovuni frá 2020.

Hagstovan skal viðlíkahalda grundardátur almennar stovnar umframt allar framleiðslueindir í Føroyum. Hetta er nýggj uppgáva fyri Hagstovuna. Mett verður, at hetta fer at krevja 1 ársverk afturat á Hagstovuni frá 2020.

Tá Virkisskráin er sett í verk í fullum líki, verður møguligt hjá borgaranum og fyritøkum at avgreiða síni viðurskifti á alnótini, og hetta fer at frígeva orku í umsitingini hjá almennu stovnunum og privatum fyritøkum. Harafturat verður møguligt at dagføra skráir hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum sjálvvirkandi og fer hetta eisini at frígeva orku og økja um góðsku í málsviðgerðini.

TAKS og Skráseting Føroya skulu viðlíkahalda grundardátur um eindir, ið hesir stovnar longu viðlíkahalda í dag, tí verður ikki mett, at hetta fer at krevja eyka kostnað á hesum stovnum.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Sí 2.2.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki, men kann vera til gagn fyri alt landið.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Talgildingin hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í síni heild.

Talgildingin skal gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleika, teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

**2.9. Marknaforðingar**
Lógaruppskotið viðførir ikki marknaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Tann, kann sektast við bót, ið ikki virðir lýsingarvernd, sbrt. § 16.

Revsing við bót er mett sum passandi inntriv í mun til lógarbrotið.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Fráboðanarskylda
Lógaruppskotið áleggur fráboðanarskyldu til løgfrøðiligar eindir, um at fráboðað grundardátur til Virkisskránna, sbrt. § 14. Ein løgfrøðilig eind er allýst í § 3 og kann t.d. vera eitt virki, einstaklingavirki, felagsskapur o.a.

Fráboðanarskylda er mett neyðug fyri at tryggja at grundardáturnar í Virkisskránni altíð eru dagførdar og álítandi.

Brúksskylda
Tað verður ásett, at almennir stovnar skulu heinta grundardátur, sbrt. § 8, úr Virkisskránni. Tað merkir, at brúksskylda skylda verður áløgd almennum stovnum, um bert at heinta grundardátur úr Virkisskránni, um hesir hava tørv á grundardátum um eindir.

Fyri at tryggja, at almennir stovnar hava dagførdar grundardátur um løgfrøðiligar eindir og framleiðslueindir, verður skotið upp, at almennir stovnar skulu heinta grundardátur úr Virkisskránni, og ikki beinleiðis frá eindini. Hetta vil hava við sær, at sleppast kann undan óneyðugum samskifti við eindirnar, umframt at hetta skal lætta um fyrisitingarligu byrðuna hjá bæði almennum stovnum og privatum eindum.

Málið við Virkisskránni er, at allir almennir stovnar heinta sínar grundardátur um eindir í Føroyum úr Virkisskránni, soleiðis at sleppast kann undan, at somu grundardátur verða heintaðar fleiri ferðir frá somu eind ella at almennir stovnar dagføra sínar egnu skráir um eindir.

Roknað verður við, at við tíðini koma allar KT-skipanir at heinta grundardátur um eindir úr Virkisskránni, og hetta vil tryggja, at grundardáturnar um eindirnar altíð eru dagførdar.

Eisini verður kravt, at almennir stovnar í øllum viðurskiftum við løgfrøðiligar eindir nýta eintýðuga eymerkinartalið, V-talið, og í øllum viðurskiftum við framleiðslueindir nýta F-talið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**

Heimildir til landsstýrismannin:
**§ 8, stk. 4**. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um at frítaka ávísar løgfrøðiligar eindir sbrt. § 3, nr. 2 heilt ella lutvíst frá, at skrásetast og viðlíkahaldast í Virkisskránni.

Orsøkin er, at í fleiri førum vilja felagsskapir, sbrt. § 3, nr. 2, vera so lítlir ella av reint privatum slag, at tað, hvørki fyri viðkomandi felagsskap ella tað almenna, er nakar ágóði í at hava grundardátur um hesar felagsskapir í Virkisskránni. Tí skal vera eitt minstamark fyri, nær slíkir felagsskapir ikki skulu vera í Virkisskránna, ella bert í ávísan mun, og hetta má byggja á eina meting hjá pørtunum. Eru partarnir ikki samdir, heimilar greinin landsstýrismanninum at áseta reglur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Virkisskráin er KT-skipan við skrá við grundardátum um virkir, stovnar, felagsskapir og aðrar fyristingarligar eindir í Føroyum; saman verða hesi kallað eindir í hesum lógaruppskoti.

Grunddátur í hesum lógaruppskoti eru dátur nevndar í § 8. Talan er um grundleggjandi upplýsingar, ið hava breiðan áhuga millum almennir stovnar og privat og har skráseting av tí einstøku grundardátuni, skal stuðla undir einfalding og effektivisering í mun til støðuna í dag.

Landsstýrismaðurin hevur ábyrgdina av Virkisskránni. Eftir ætlan verður raksturin av Virkisskránni, t.e. tekniskt viðlíkahald og menning, partur av vanliga virkseminum á Gjaldstovuni, sum er undirløgd landsstýrismanninum. Stjórin á Gjaldstovuni skal standa fyri dagligu leiðsluni og fyrisitingini av Virkisskránni.

Virkisskráin verður ment sum partur av verkætlanini Talgildu Føroyar. Talgildu Føroyar er verkætlan, sum Fíggjarmálaráðið varðar av.

Virkisskráin er felags skrá, sum gagnnýtur skráir/dátur, sum longu eru, og tí er ætlanin at skráseting og viðlíkahald skal fara fram í samstarvi við Skráseting Føroya, TAKS og Hagstovuna, sum ásett í § 9. Skráseting Føroya og TAKS hava longu í dag samskifti við eindir, og verða tí væntandi ikki tyngdir munandi við uppgávum meir enn í dag. Heldur tvørturímóti skal Virkisskráin lætta um dagliga arbeiðið á hesum stovnum.

Í lógaruppskotinum verður skráin um eindir í Føroyum nevnd Virkisskráin. Við hesum er tó ikki avgjørt, at hetta skal vera heitið á skránni í framtíðini, men er bert ein stytting í hesi lóg.

**Til § 2**

*Til nr. 1)*
Virkisskráin skal innihalda grundardátur um eindir, sum skulu verða atkomuligar hjá øllum áhugaðum.

Tørvurin á grundardátum er ymiskur og grundardáturnar kunnu nýtast í ymiskum samanhangum. Við hesum fyri eyga er mett skilagott, at eindirnar og grundardátur teirra verða býttar upp í tveir høvuðsbólkar í hesi lóg: 1) grundardátur, ið knýta seg til eindina sum løgfrøðilig eind, og 2) grundardátur, ið knýta seg til virksemi hjá eindini á einari ávísari adressu. Seinni bólkurin er býttur í framleiðsueindir og undirframleiðslueindir.

Hugtakið løgfrøðilig eind er allýst í § 3, hugtakið framleiðslueind er allýst í § 4, stk. 1 og hugtakið undirframleiðslueind er allýst í § 4, stk. 2.

*Til nr. 2)*
Virkisskráin skal útvega eintýðugt eyðmerkingartal av hvørjari einstakari eind, ið verður skrásett í Virkisskránni. Sí §§ 5 og 6.

<u>Eintýðugt eyðmerkingartal til løgfrøðiligu eindirnar (V-talið)</u>

Eins og við p-talinum fyri persónar, skal V-talið nýtast sum eintýðug eyðmerking av løgfrøðiligum eindum í Føroyum. Sammett við p-talið er V-talið alment atkomuligt hjá øllum.

Í samskiftinum millum almennar stovnar og virkir og onnur, skal V-talið tryggja, at sleppast kann undan samanblanding og dupultskráseting.

Útgangsstøðið er, at sama V-tal skal fylgja løgfrøðiligu eindini frá stovnan til uppathald.

Eintýðugt eyðmerkingartal til framleiðslueindir (F-talið)
Í samband við at høvuðsvirksemi hjá løgfrøðiligari eind verður skrásett, verður framleiðslueind stovnað (skrásett) við einum F-talið. Framleiðslueindin hevur sum útgangsstøði sama F-tal frá stovnan til uppathald.

Fleiri virkir hava framleiðslueindir staðsettar á fleiri ymiskum adressum. Hetta kann t.d. vera størri virkir so sum handilsketur, byggifeløg, bankar o.fl., ella minni fyritøkur í t.d. hava fleiri handlar, tænastur ella framleiðslur á tveimum ella fleiri adressum. Fyri summar almennar stovnar og privat virkir vilja grundardátur um framleiðslueindir í ávísum førum vera meira viðkomandi enn grundardátur um løgfrøðiligu eindina.

Tilfelli har yvirlit yvir framleiðslueindir kann verða til gangs, kann t.d. vera í sambandi við:

- virksemi hjá eftirlitsmyndugleikum - t.d. Arbeiðs- og brunaeftirlitið ella Heilsufrøðiliga starvsstovan. Mett verður, at hesir myndugleikar betri kunnu fyrireika og fremja sínar uppgávur við at fáa dagførdar grundardátur um framleiðslueindirnar (til stakkanningar, brunasýn osv.).
- virksemi hjá renovatiónsfeløgum (t.d. IRF). Við at fáa dagførdar grundardátur um framleiðslueindir, kann lættast um í samband við innheintan av burturkasti og rottangatøming.
- at rokna út fjarstøðu til arbeiðspláss í samband við ferðastuðul (koyripengar).

Undir F-talinum kunnu tí finnast grundardátur um, hvar virksemið/framleiðslan fer fram (er).

Eyðmerking av framleiðslueindum, hevur m.a. eisini til endamáls yvir tíð at kunna fylgja høvuðsvirkseminum. Hetta inniber t.d. at eitt eigaraskifti, har høvuðsvirksemi heldur fram óbroytt, ikki ber við sær broytingar í framleiðslueindini og F-talinum hjá hesari. Ein flyting av framleiðsluni til eina aðra adressu uttan broytingar í ognarrætti (eigaraviðurskiftum) ella høvuðsvirksemi vil heldur ikki broyta framleiðslueindina ella F-talið hjá hesari.

Eintýðugt eyðmerkingartal til undirframleiðslueindir (UF-talið)
Tá virksemið í eini framleiðslueind er blandað, so kann gerast neyðugt at útgreina virksemið í fleiri partar. Dømi: eitt fiskavirki hevur eina søludeild, sum eisini selur framleiðslu hjá øðrum fyritøkum. Her verður talan um tvær undirframleiðslueindir: ein fyri framleiðslu og ein fyri sølu.

*Til nr. 3)*
Eitt av endamálunum við at seta á stovn Virkisskránna eru líkindini fyri at umsitingin hjá almennum stovnum verður effektivari, um teir deila grundardátur sínámillum. Við hesum kann sleppast undan dupultarbeiði, umframt at almennir stovnar ikki skulu heinta somu grundardátur um eindir í fleiri umførum.

Tað er somuleiðis eitt av endamálunum við Virkisskránni, at gera grundardátur tøkar fyri bæði almennar stovnar og privat virkir og felagsskapir o.fl. Í dag viðlíkahalda t.d. kommunur og privat virki egnar skráir um eindir. Hesi kunnu fáa gagn av einari almennari, miðsavnaðari skrá, sum helst skuldi bøtt um góðskuna í slíkum skráum hjá kommunum, privatum virkjum og øðrum.

Privat virkir kunnu eisini fáa gagn av adressu upplýsingum, sum t.d. eru útvaldir við støði í stødd, vinnugrein og/ella adressu í samband við t.d. framsending av upplýsingartilfari. Harumframt kunnu telefonnummur hjá virkjum t.d. brúkast at fylgja upp avtalum ella sendum tilfari.

**Til § 3**
Virkisskráin skal innihalda grundardátur um løgfrøðiligar eindir. Í § 3 verður allýst, hvat skilst við løgfrøðiligar eindir.

Hugtakið løgfrøðiligar eindir skal skiljast sera breitt, og skal fevna um, men ikki avmarka til, øll virkir, einstaklingavirkir, stjórnarráð, stovnar, kommunur, kommunalar felagsskapir, felagsskapir (undir hesum eisini frítíðarfelagsskapir, ið hava viðurskifti við tað almenna) og aðrar fyrisitingarligar eindir í Føroyum.

Ein løgfrøðilig eind skal ikki misskiljast við ein løgfrøðiligan persón í hesi lóg, men skal skiljast í einum breiðari týdningi. Ein løgfrøðiligur persónur er bert ein deilmongd av hugtakinum løgfrøðilig eind í hesi lóg.

*Til nr. 1)*
Løgfrøðilig eind, í hesi lóg, fevnir um likamligar persónar, sum eru arbeiðsgevarar ella sjálvstøðugt vinnurekandi. Hetta er eyðkent við, at tað er virksemi hjá likamligum persónum fyri egna rokning, ið hevur sum endamál at fáa fíggjarligt yvirskot.

Bert likamligir persónar sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi, og hava ein umsetning yvir 30.000 kr. um árið, ella sum eru arbeiðsgevarar roknast sum løgfrøðiligar eindir sambært hesum lógaruppskotið. Orsøkin er, at slíkir sjálvstøðugt vinnurekandi ikki hava skyldu at rinda meirvirðisgjald ella skulu rinda løn umvegis afturhaldsskipanina og tískil ikki eru skrásettir í Vinnuskránni hjá TAKS.
Slíkir sjálvstøðugt vinnurekandi hava so lítið virksemi, at tað, hvørki fyri viðkomandi sjálvstøðugt vinnurekandi ella tað almenna, helst ikki er nakar ágóði í, at hava grundardátur um hesar í Virkisskránni.
Markið á 30.000 kr. er sett við støði í meirvirðisgjaldslógini § 4 um avgjaldsfrítøku.

*Til nr. 2)*
Løgfrøðilig eind í hesi lóg fevnir um løgfrøðiligar persónar og deildir hjá útlendskum løgfrøðiligum persónum. Hugtakið løgfrøðiligur persónur skal her skiljast sum øll vinnurekandi og ikki-vinnurekandi feløg so sum parta- og smápartafeløg, íognarfeløg, íverksetarafeløg, grunnar, samvinnufeløg, lutafeløg, fyritøkur við avmarkaðari ábyrgd, felagsskapir og onnur samtøk við sjálvstøðugum rættarføri.

Løgfrøðiligur persónur í hesi lóg fevnir eisini um allar felagsskapir í Føroyum.
Hetta kunnu t.d. verða serstakir felagsskapir, ið hava til endamáls at hagreiða, góðska ella selja framleiðslu limanna, ella sum hava til endamáls at keypa, útvega ella framleiða

limunum vørur og tænastur, sum bert verða nýttar vinnuliga av limunum,og sum - burtursæð frá vanligari rentu av innskoti limanna - býta avlopið sundur millum limirnar í mun til, hvussu nógv teir hava latið felagnum av úrdráttum til hagreiðingar, góðskingar ella sølu, og íløgufeløg, í tann mun tey hava inntøku av vinnu, her uppi í vinning við keyp og sølu av virðisbrøvum, rentutilskriving, v.m.

Ein felagsskapur kann eisini vera onnur feløg, felagsskapir, legat í tann mun, tey hava inntøku av vinnu, har uppií rakstur, burturleigu av ella tað at lata annan hava í hondum fastogn.

Talan kann eisni vera um ikki-vinnulig feløg, felagsskapir og samtøk við lógligum endamálið. Hetta kundi t.d. verið ítróttarfeløg, Blái Krossur og onnur frítíðarfeløg.

Í fleiri førum vilja slíkir felagsskapir vera so lítlir ella av reint privatum slag, at tað, hvørki er fyri viðkomandi felagsskap ella tað almenna, er nakar ágóði í at hava grundardátur um hesar í Virkisskránni. Tí skal vera eitt minstamark fyri, nær slíkir felagsskapir skulu í Virkisskránna, og hetta má byggja á eina meting hjá pørtunum. Um ein felagsskapur hevur eitt ávíst samskifti við almennar stovnar, er hetta ein ábending um, at felagsskapurin skal vera skrásettur í Virkisskránni (t.d. umsókn um stuðul, umsókn um skatta- og avgjaldsfrælsi).

Um eitt útlendskt virki stovnar deild í Føroyum, skal deildin skrásetast í Virkisskránni.

Bert virksemi í Føroyum skal skrásetast í Virkisskránni.

*Til nr. 3)*
Løgfrøðilig eind vil í hesi lóg fevna um øll stjórnarráð, t.d. Fíggjarmálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Heilsu- og innlendismálaráðið, og stovnar undir stjórnarráðunum, t.d. Gjaldstovan, Umhvørvisstovan, fólkaskúlar, miðnámsskúlar, Kringvarp Føroya o.s.fr. Undir hesum kunnu eisini skrásetast sendistovur og ríkisstovnar í Føroyum, so sum Sorinskrivarin (Føroya Rættur), Ríkisumboðið og løgreglan.

*Til nr. 4)*
Løgfrøðilig eind í hesi lóg fevnir um allar kommunur í Føroyum. Stovnar undir kommunum, t.d. barnagarðar, ellis- og røktarheim, tónlistaskúlar o.s.fr., eru sum útgangsstøði framleiðsueindir undir kommunum.

*Til nr. 5)*
Løgfrøðilig eind í hesi lóg fevnir um kommunal samstørv, sum t.d. SEV, IRF, bú- og heimatænastur, barnaverndin, Kommunufelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Til § 4**

*Til stk. 1.*
Virkisskráin skal innihalda grundardátur um framleiðslueindir. Í § 4 verður allýst, hvat skilst við framleiðslueind.

Tá ið ein framleiðslueind verður skrásett, skal støða takast til, hvørja vinnugrein høvuðsvirksemið er fevnt av, við støði í t.d. føroysk vinnugreinaskipan 2008 (FV 2008).

Virksemi, ið ikki er á fastari adressu, t.d. handverkarar, bátar ella bilar, ið fara til ymiskar adressur við ella eftir síni vøru ella tænastu, skulu ikki roknast sum sjálvstøðugar framleiðslueindir, men knýtast til tað adressu hesi virka út frá.

*Til nr.1)*
Um ein løgfrøðilig eind hevur virksemi, ið bert verður framt á ella frá einari adressu, er talan um eina løgfrøðiliga eind, við bert einari framleiðslueind.

Hetta kann til dømis vera eitt smápartafelag, ið rekur handilsvirksemi (t.d. "Høvuðsbólkur 46 Onnur heilsøla" í FV2008). Alt virksemi fer fram á einari adressu. Hetta smápartafelag hevur bert eina framleiðslueind.

Í nógvum førum, sum í omanfyrinevnda dømi, vil framleiðsueindin vera samanfallandi við adressuna hjá løgfrøðiligu eindina, tó fær løgfrøðiliga eindin eitt eyðmerkingartal til løgfrøðiligu eindini, sbrt. § 5, og eitt eyðmerkingartal til framleiðslueindina, sbrt. § 6, stk. 1. Hesi tøl skulu vera ymisk.

*Til nr. 2)*
Um ein løgfrøðilig eind hevur virksemi, ið fer fram á ella frá fleiri adressum, so er talan um eina løgfrøðiliga eind við fleiri framleiðslueindum.
Ein løgfrøðilig eind kann innihalda fleiri framleiðslueindir, sjálvt um løgfrøðiliga eindin bert hevur eittans høvuðsvirksemi. Tað er galdandi, um ein partur av virkseminum hjá løgfrøðiligu eindini er á aðrari adressu.

Hetta kann til dømis vera eitt smápartafelag, ið rekur handilsvirksemi. Smápartafelagið hevur ein handil í Klaksvík og ein í Tórshavn. Hetta smápartafelag hevur tvær framleiðslueindir, við tveimum ymiskum eyðmerkingartølum, sbrt. § 6, stk. 1, eitt fyri handilsvirksemi á adressu 1 í Klaksvík og eitt fyri handilsvirksemi á adressu 2 í Tórshavn.

Almennir stovnar, sbrt. § 3, nr. 3-5, hava eisini framleiðslueindir. Hetta eru t.d. barnagarðar hjá kommunum, ymiskir stovnar undir Landsverk o.a.

Á fakmáli innan hagfrøði verða framleiðslueindir vanliga nevndar: Local Units (LU)

*Til stk. 2.*
Um ein framleiðslueind hevur fleiri ymisk týðandi virksemi (ymiskar vinnugreinar), ið fara fram á ella frá somu adressu, so er talan um eina framleiðslueind, við fleiri undirframleiðslueindum.

Hetta kann til dømis vera eitt smápartafelag, ið rekur handilsvirksemi (t.d. "Høvuðsbólkur 46 Onnur heilsøla" í FV2008) og byggivirksemi (t.d. "Høvuðsbólkur 41 Húsasmíð" í FV2008). Virksemi, bæði handilin og handverkarar (til byggivirksemi), fer fram á ella frá einari adressu. Hetta smápartafelag hevur tvær undirframleiðslueindir, og fær, umframt eyðmerkingartal til framleiðslueindina, sbrt. § 6, stk.1, tvey ymisk eyðmerkingartøl tillutað undirframleiðslueindunum, sbrt. § 6, stk.2, eitt tal til handilsvirksemi og eitt til byggivirksemi.

Á fakmáli innan hagfrøði verða undirframleiðslueindir vanliga nevndar: Local Kind of Activity Units (LKAU).

**Til § 5**

Løgfrøðiligu eindirnar fáa tilluta eitt eintýðugt eyðmerkingartal (V-tal). Sum útgangsstøði, skal talið fylgja løgfrøðiligu eindini frá stovnan til uppathald. Við hesum er tó ikki avgjørt, at V-tal skal vera heitið á talinum í framtíðini, men er bert ein stytting í hesi lóg.

Hetta V-tal er sama v-tal, sum í dag verður nýtt sum høvuðstal fyri løgfrøðiligar endir í vinnuskránni hjá TAKS. V-talið í vinnuskránni hjá TAKS er valt av tí orsøk, at tað er væl útbreitt í samfelagnum og longu í dag nýtt sum eintýðugt eyðmerkingartal í fleiri KT-skipanum runt landið.

Verður ein partur av einari løgfrøðiligar eind skildur frá til annað sjálvstøðugt virksemi, ella verður ein partur avhendaður til aðra løgfrøðiliga eind, vil hetta ikki ávirka V-talið hjá upprunaligu eindini.

Likamligir persónar skulu skrásetast sum givnir, tá hesir ikki longu reka sjálvstøðugt vinnuvirksemi ella eru arbeiðsgevarar.

**Til § 6**

*Til stk. 1.*
Í samband við skráseting av høvuðsvirksemi hjá einari løgfrøðiligari eind, verða framleiðslueindirnar skrásettar við einum eintýðugum talið. Hetta tal verður nevnt F-talið (F fyri Framleiðslueind). Við hesum er tó ikki avgjørt, at hetta skal vera heitið á talinum í framtíðini, men er bert ein stytting í hesi lóg.

Talið verður tillutað í KT-skipanini, sum Virkisskráin verður umsitin í.

Løgfrøðiligar eindir, ið bert hava eitt høvuðsvirksemi á einari adressu, fáa bæði eitt V-tal og eitt F-tal. F-talið er galdandi frá, at framleiðslueind verður stovna til hon heldur uppat.

Stovnan av framleiðslueindum hevur m.a. til endamál at kunna fylgja høvuðsvirkseminum yvir tíð. Hetta merkir t.d. at eitt eigaraskifti, har høvuðsvirksemið heldur fram óbroytt, ikki viðførir broyting í framleiðslueindini og F-talinum hjá hesi eind. Flyting av adressu frá einum stað til eitt annað, vil heldur ikki viðføra broyting í framleiðslueindini ella F-talinum hjá hesi eind.
Tað byggir tó á eina meting, um ein framleiðslueind er broytt í so stóran mun, at tað má metast sum uppathald av uppruna framleiðsluni, og ein nýggj framleiðslueind eigur at verða stovnað.

*Til stk. 2.*
Í samband við at ein framleiðslu verður býtt upp í undirframleiðslueindir, verða undirframleiðslueindirnar skrásettar við einum eintýðugum talið. Hetta tal verður nevnt UF-talið (UF fyri UndirFramleiðslueind). Við hesum er tó ikki avgjørt, at hetta skal vera heitið á talinum í framtíðini, men er bert ein stytting í hesi lóg.

Talið verður tillutað í KT-skipanini, sum Virkisskráin verður umsitin í.

Stovnan av undirframleiðslueindum hevur eins og við framleiðslueindunum m.a. til endamál at kunna fylgja virkseminum yvir tíð. Tá virksemið í eini framleiðslueind er blandað, so kann gerast neyðugt at útgreina virksemið í fleiri partar, fyri at innheinta nýtilig hagtøl.

**Til § 7**
Við hesum verður heimild fingin til vega fyri at heinta og útflýggja grundardátur úr skráum, sum eru at finna í dag hjá Skráseting Føroya og TAKS. Hesar skráir kunnu innihalda, umframt grundardátur um eindir, eisini persónsupplýsingar, t.d. p-tal, navn og bústað hjá nevndarlimum. Við hesi grein verður viðgerð (heintan og útflýggjan) av hesum upplýsingum heimilað í lóg, og uppfyllir tí kravið í persónsupplýsingarlógini § 9, stk. 1.

Orsøkin til orðingina *"undir hesum eisini upplýsingar hesar skráir hava fingið úr fólkayvirlitinum"* er, at tryggja lógarheimild til eisini at heinta og útflýggja upplýsingar (hesar eru p-tal, navn og adressu), ið hesar skráir hava heinta úr fólkayvirlitinum hjá Umhvørvisstovuni, og soleiðis uppfylla kravið um lógarheimild í Løgtingslóg um fólkayvirlit § 31 stk. 1, ið sigur: "Ein myndugleiki kann bara lata upplýsingar, undir hesum vard nøvn og bústaðir, fingnar eftir §§ 28-30, víðari til aðrar almennar myndugleikar ella privat, tá ið hetta er heimilað í lóg, ella tá ið Innlendismálaráðið hevur givið loyvi til tess."
Ætlanin er ikki, at vard nøvn og bústaðir, skulu vera partur av Virkisskránni.

Stk. 2 gevur heimild til at heinta og útflýggja grundardátur beinleiðis úr fólkayvirlitinum hjá Umhvørvisstovuni. Tvs. ikki umvegis skráir hjá TAKS ella Skráseting Føroya, sum ásett í stk.1. Hesar grundardátur úr fólkayvirlitinum eru p-tal, navn og adressa hjá stjórn og nevndarlimum.

P-talið verður bert brúkt til eintýðuga eyðmerking av persónum í Virkisskránni, men skal ikki útflýggjast úr Virkisskránni, sum ásett í § 15, stk. 2 í hesi lóg.

**Til § 8**
Her verður nágreiniliga ásett, hvørjar grundardátur skrásetast í Virkisskránni fyri ávikavist løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir. Hesar eru valdar eftir fylgjandi meginreglum:

- Talan er um grundleggjandi upplýsingar
- Upplýsingarnir skulu hava breiðan áhuga millum almennir stovnar og privat.
- Skráseting av tí einstøku grundardátuni, skal stuðla undir einfalding og effektivisering í mun til støðuna í dag.

Ávísar grundardátur finnast møguliga bert fyri ávísar eindir, og skulu tí sjálvsagt bert skrásetast fyri hesar. T.d. hava allar løgfrøðiligar eindir ikki grannskoðara, og skulu tí heldur ikki upplýsa hesa grundardátu.

*Til stk. 1*

*Til nr. 1)*
Undir "V-tal" verður skrásett eintýðuga eyðmerkingartalið sum tilluta sbrt. § 5.

*Til nr. 2)*
Undir "Navn og hjánøvn" verður skrásett almenna navnið hjá løgfrøðiligu eindini umframt møgulig hjánøvn.

*Til nr. 3)*
Undir "Virkisháttur" verður skrásett, undir hvørjum løgfrøðiligum bygnaði eindin verður rikin, t.d. einstaklingavirki, íognarfelag, partafelag, eind í miðfyrisitingini o.s.fr.

*Til nr. 4)*
Undir "Byrjanardagfesting" verður skrásett dagfestingin, eindin varð stovnað.

*Til nr. 5)*
Um eindin ikki er virkin longur, verður uppathaldsdagfesting skrásett her.

*Til nr. 6)*
Undir "Adressa" verður skrásettadressan, har løgfrøðiligan eindin hevur sítt høvuðssæti.

*Til nr. 7 og 8)*
Fyri stjórn og nevnd í løgfrøðiligum eindum verður skrásett navn, privat adressa og p-tal.

*Til nr. 9)*
Undir "Grannskoðari" verður grannskoðarin hjá eindini skrásettur, um hetta er viðkomandi.

*Til nr. 10)*
Undir "Geiri" verður skrásett í hvørjum geira eindin hevur virksemi í. Útgangsstøðið kann takast í ESA2010 (The European System of National and Regional Accounts). ESA 2010 er ein roknskapar-standardur, ið verður nýttur av ES-londunum, og m.a. skal viðvirka, at øll londini brúka somu avmarkingar fyri geirar í samfelagnum, t.d. hvat virksemi verður roknað sum partur av almenna geiranum o.s.fr.

*Til nr. 11)*
Undir "Vinnugrein og møgulig hjávinnugrein" verður skrásett vinnugrein t.d. við støði í føroysk vinnugreinaskipan 2008 (FV 2008). Sama skipan verður nýtt fyri møguligum hjávinnugreinum. FV2008 er vinnugreinskipan, ið nýtt verður til at flokka búskaparligt virksemi í Føroyum.

*Til nr. 12)*
Undir "Starvsfólkatal" verður skrásett starvsfólkatal.

*Til nr. 13)*
Her verður skrásett eintýðuga eyðmerkingartalið, sbrt. § 6, stk. 1, fyri framleiðslueindirnar, ið eru atknýttar V-talinum skrásett í nr. 1).

*Til nr. 14)*
Undir "Kontaktupplýsingar" verður skrásett postadressa, telefonnummar, EAN-nummar, teldupostadressa og heimasíða hjá løgfrøðiligu eindini.

*Til nr. 15)*
Her verður skrásett eintýðuga skrásetingarnummarið hjá løgfrøðiligu eindini. Skrásetingarnummarið verður í dag nýtt í skráum hjá Skráseting Føroya. Framyvir skal V-talið vera einasta eyðmerkingartalið av løgfrøðiligum eindum í Føroyum samsvarandi hesum lógaruppskoti. Tískil skal skrásetingarnummarið hjá Skráseting Føroya líðandi avtakast og nýggjar løgfrøðiligar eindir fáa ikki tillutaða slíkt skrásetingarnumar.

*Til nr. 16)*

Her verður skrásett, hvørt løgfrøðiliga eindin sambært meirvirðisgjaldslógini (mvg-lógin) er mvg skyldug ella ei.

*Til stk. 2*

*Til nr. 1)*
Undir "F-tal" verður skrásett eintýðuga eyðmerkingartalið sum tillutað sbrt. § 6, stk. 1.

*Til nr. 2)*
Her verður skrásett V-tal, sum framleiðslueindin hoyrir til.

*Til nr. 3)*
Undir "navn ella nevni" verður skrásett navn ella serligt nevni, ið vanliga verður nýtt um hesa framleiðslueindina.

*Til nr. 4)*
Undir "Byrjanardagfesting" verður skrásett dagfestingin, tá ið framleiðslueindin varð stovnað.

*Til nr. 5)*
Um framleiðslueindin ikki er virkin longur, verður uppathaldsdagfesting skrásett her.

*Til nr. 6)*
Undir "Adressa" skal altíð skrásetast tann adressan, ið vísir hvar framleiðslueindin reint fysiskt er.

*Til nr. 7)*
Her verður skrásett navn, privat adressa og p-tal hjá stjórnini fyri framleiðslueindina.

*Til nr. 8)*
Undir "Vinnugrein og møgulig hjávinnugrein" verður skrásett vinnugrein við støði í føroysk vinnugreinaskipan 2008 (FV2008). Sama skipan verður nýtt fyri møguligar hjávinnugreinar. FV2008 er vinnugreinskipan, ið nýtt verður til at flokka búskaparligt virksemi í Føroyum.

*Til nr. 9)*
Undir "Starvsfólkatal" verður skrásett starvsfólkatal.

*Til nr. 10)*
Undir "Kontaktupplýsingar" verður skrásett postadressa, telefonnummar, EAN-nummar, teldupostadressa og heimasíða hjá framleiðslueindini.

*Til nr. 11)*
Her verður skrásett eintýðuga eyðmerkingartalið, sbrt. § 6, stk. 2, fyri undirframleiðslueindirnar, ið eru atknýttar F-talinum skrásett í nr. 1).

*Til stk. 3.*

*Til nr. 1)*

Undir “UF-tal” verður skrásett eintýðuga eyðmerkingartalið til undirframleiðslueindina sum tillutað sbrt. § 6, stk. 2.

*Til nr. 2)*
Her verður skrásett F-tal, sum undirframleiðslueindin hoyrir til.

*Til nr. 3)*
Undir “navn ella nevni” verður skrásett navn ella serligt nevni, ið vanliga verður nýtt um hesa undirframleiðslueindina.

*Til nr. 4)*
Undir “Byrjanardagfesting” verður skrásett dagfestingin, tá ið undirframleiðslueindin varð stovnað.

*Til nr. 5)*
Um undirframleiðslueindin ikki er virkin longur, verður uppathaldsdagfesting skrásett her.

*Til nr. 6)*
Undir “Adressa” skal altíð skrásetast tann adressan, ið vísir hvar undirframleiðslueindin reint fysiskt er.

*Til nr. 7)*
Her verður skrásett navn, privat adressa og p-tal hjá stjórnini fyri undirframleiðslueindina.

*Til nr. 8)*
Undir “Vinnugrein” verður skrásett vinnugrein við støði í føroysk vinnugreinaskipan 2008 (FV2008). FV2008 er vinnugreinskipan, ið nýtt verður til at flokka búskaparligt virksemi í Føroyum.

*Til nr. 9)*
Undir “Starvsfólkatal” verður skrásett starvsfólkatal.

*Til nr. 10)*
Undir “Kontaktupplýsingar” verður skrásett postadressa, telefonnummar, teldupostadressa og heimasíða hjá undirframleiðslueindini.

*Til stk. 4.*
Landsstýrismaðurin fær heimild at frítaka ávísar løgfrøðiligar eindir frá, ella í ávísan mun frá, at skrásetast og viðlíkahaldast í Virkisskránni.

Orsøkin til hetta er, at í fleiri førum vilja felagsskapir, sbrt. § 3, nr. 2, vera so lítlir ella av reint privatum slag, at tað, hvørki fyri viðkomandi felagsskap ella tað almenna, er nakar ágóði í at hava grundardátur um hesar felagsskapir í Virkisskránni. Tí skal vera eitt minstamark fyri, nær slíkir felagsskapir (sum ikki eru skrásetingarskyldugir annars eftir skattalógini v.m.) skulu í Virkisskránna, og hetta má byggja á eina meting hjá Landsstýrismanninum.

Hevur ein felagsskapur eitt ávíst samskifti við almennar stovnar, so er hetta ein ábending um, at felagsskapurin skal vera skrásettur í Virkisskránni (t.d. umsókn um stuðul, umsókn um skatta- og avgjaldsfrælsi osv.).

**Til § 9**

*Til stk. 1.*
Í dag rekur og viðlíkaheldur TAKS skráir, ið rúma grundardátur um likamligar persónar, sum eru arbeiðsgevarar ella sjálvstøðugt vinnurekandi. Hetta broytist ikki við hesi lóg, hóast grundardátur úr hesum skráum verða heintaðar og síðan sýndar fram í Virkisskránni.

*Til stk. 2.*
Í dag reka og viðlíkahalda TAKS og Skráseting Føroya skráir, ið rúma grundardátur um løgfrøðiligar persónar, deildir undir útlendskum løgfrøðiligum persónum og felagsskapir. Hetta broytist ikki við hesi lóg, hóast grundardátur úr hesum skráum verða heintaðar og síðan sýndar fram í Virkisskránni.

Meir nágreiniligt er býtið millum TAKS og Skráseting Føroya viðvíkjandi ábyrgdini av viðlíkahaldi av grundardátunum til ymisku virkisháttirnar væntandi hendan:

TAKS:

| **Virkisnavn** |
|---|
| Sjálvognarstovnur |
| Ikki vinnurekandi grunnur |
| Íognarfelag |
| Fastognalánsfeløg, útlánsfeløg og onnur veðlánsfeløg |
| Íløgufelag |
| Felagsskapir |
| Lutafelag |
| Einstaklingavirki |
| Útlendskt virki (MVG) |
| Útlendskt virksemi |
| Partsreiðarí |

Skráseting Føroya:

| **Virkisnavn** |
|---|
| Vinnurekandi grunnur |
| Eftirlønargrunnur |
| Íognarfelag |
| Kommandittfelag (Samløgufelag) Partnarafelag |
| Partafelag |
| Smápartafelag |
| Íverksetarafelag |
| Tryggingarfelag |
| Lutafelag LVAÁ og Felagsskapur FAVÁ |
| Sparikassi |
| Filial |

*Til stk. 3.*
Hagstovan skal viðlíkahalda grundardátur um almennar stovnar, undir hesum stjórnarráð og stovnar undir hesum, kommunur og kommunal samstørv.

*Til stk. 4.*
Hagstovan skal viðlíkahalda grundardátur um framleiðslueindir og undirframleiðslueindir í Virkisskránni.

**Til § 10**
Við hesi áseting verður heimilað, at aðrir stovnar enn teir í § 9 nevndu, kunnu viðlíkahalda grundardátur um ávísar løgfrøðiligar eindir, framleiðslueindir og undirframleiðslueindir. Endamálið við hesum er, at aðrir stovnar sum javnan hava samskifti við ávísar løgfrøðiligar eindir ella framleiðslueindir, t.d. í samband við eftirlit, skjótari fáa vitan um skeivar skrásetingar, og kunnu við hesum fáa heimild at rætta hesar skeivleikar.

Hetta krevur avtalu við ábyrgdara av viðlíkahaldi, sbrt. § 9, og umsitara av Virkisskránni. Umsitari av Virkisskránni er eftir ætlan Gjaldstovan.

**Til § 11**
Ásetingin heimilar, at skráseting av løgfrøðiligum eindum, kann fremjast umvegis Virkisskránna, um hetta ikki stríðir við lóggávu annars. Serliga kann tað vera vinnufelagslóggáva ið ger, at tað ikki er møguligt at fremja skráseting av ávísum eindum umvegis Virkisskránna og at hetta tí fyrst krevur lógarbroytingar í vinnufelagslóggávu.

Við orðingini “fer fram” skal í hesum sambandi skiljast, at sjálv formella skrásetingin, t.e. góðkenning av skrásetingin/stovnanini framvegis fer fram hjá rætta góðkenningarmyndugleika, sum t.d. Skráseting Føroya av kapitalfeløgum ella TAKS av einstaklingavirkjum (mvg skráseting o.s.fr.), men møguligt er, fyri at lætta um tilgongdina fyri bæði stovnara og góðkenningarmyndugleika, at sjálvgreiðsla til at skráseta umframt at broyta og strika grundardátur, kann fara fram umvegis Virkisskránna og har frá verða send rætta myndugleika til góðkenningar.

Eingin góðkenningarmyndugleiki er í dag ísv. stovnan av framleiðslueindum og undirframleiðslueindum, og tað er ikki mett neyðugt, at nevna hesar beinleiðis í hesi grein, m.a. í tí hesar ikki krevja somu formellu stovnan, men bert skulu tilknýtast tilhoyrandi løgfrøðiligu eindina. Hendan grein er tó ikki til hindurs fyri, at sjálvgreiðsla til at skráseta, broyta og strika grundardátur um framleiðslueindir og undirframleiðslueindir, kann útstillast umvegis Virkisskránna.

**Til § 12**
Sambært hesi áseting, skulu allir almennir stovnar nýta V-talið í øllum viðurskiftum sum eyðmerking av løgfrøðiligum eindum og í øllum viðurskiftum við framleiðslueindir nýta F-talið. Hetta er galdandi bæði innanhýsis millum stovnar og í samskifti við einstøku løgfrøðiligu eindina.

Hetta merkir, at V-talið t.d. týðiliga skal síggjast í brøvum, teldupostum og øðrum tilfari frá almennum stovnum.

Við almennum stovnum skilst í hesi lóg, almennir myndugleikar, stovnar o.tíl. fevndir av § 1, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg. Lógin umfatar tískil bæði stovnar í mið- og kommunalu fyrisitingunum umframt nevndir og ráð o.s.fr.

**Til § 13**

Tað verður ásett, at almennir stovnar skulu heinta grundardátur, sbrt. § 8, úr Virkisskránni. Tað merkir, at brúksskylda verður áløgd almennum stovnum, at bert heinta grundardátur úr Virkisskránni, um hesir hava tørv á grundardátum um eindir.

Ein málsetningur við Virkisskránni er, at allir almennir stovnar heinta sínar grundardátur um eindir í Føroyum úr Virkisskránni, soleiðis at sleppast kann undan, at somu grundardátur verða heintaðar fleiri ferðir frá somu eind ella at almennir stovnar dagføra sínar egnu skráir um eindir.

Tað verður væntandi møguligt at fáa grundardátur úr Virkisskránni á (minst) tveir háttir:

1) við at sláa upp í Virkisskránni á t.d. serligari heimasíðu til endamálið. Hetta krevur onga serliga KT-skipan hjá móttakara.
2) at fáa leypandi dagføringar av grundardátum til móttakarans KT-skipan. Hetta krevur knýti í Virkisskránna og krevur tillagingar í KT-skipan mótakarans. Hetta knýti skal gerast umvegis Heldina, sbrt. "Rundskriv um Heldina" frá 21. oktober 2016.

Við at allir almennir stovnar heinta sínar grundardátur á einum staði, verður mett, at hetta er við til at tryggja grundardáturnar um eindirnar altíð eru dagførdar og at eindirnar verða órógvaðar minst møguligt av tí almenna.

Um KT-skipanin, sum Virkisskráin verður umsitin í, heintar sínar grundardátur frá einari keldu, sum t.d. úr skrá hjá Skráseting Føroya, so skal henda grein ikki skiljast á tann hátt, at almennir stovnar ikki eisini kunnu menna sínar KT-skipanir soleiðis, at hesar eisini knýta sína KT-skipan til somu keldu sum Virkisskráin, um hetta reint tøkniliga er skilabesta loysnin.

**Til § 14**

*Til stk. 1.*
Við hesi áseting, verður fráboðanar og dagføringarskylda áløgd løgfrøðiligu eindunum..

Vanliga mannagongdin við at fáa grundardátur inn í Virkisskránna skal verða, at grundardáturnar koma inn í samband við at eindin verður stovnað ella heldur uppat. Hetta fyri at tað almenna annars skal órógva eindirnar minst møguligt.

Tað er tó mett neyðugt at seta hesa heimild inn, ið áleggur fráboðanar- og dagføringarskyldu. Orsøkin til hetta er, at tryggja at góðskan á grundardátunum í Virkisskránni er á so høgum støði sum gjørligt.

*Til stk. 2.*
Við hesi áseting, verður fráboðanarskylda áløgd løgfrøðiligum eindum viðvíkjandi undirframleiðslueindum, men bert eftir áheitan frá Hagstovuni.

Vænta verður, at tað verður sera sjáldan at tørvur verður á at skráseta undirframleiðslueindir, tí er hetta ikki nakað, ið fer at tyngja vinnulívið í Føroyum.

**Til § 15**

*Til stk. 1.*
Sum meginregla, skulu grundardátur í Virkisskránni vera alment atkomuligar, og hetta merkir, at øll hava rætt til at fáa útflýggjað tær grundardátur, ið eru í Virkisskránni, tó við teim undantøkum og krøvum, sum eru ásett í stk. 2-4 ella í aðrari lóggávu.

Orsøkin til orðingina *"ella í aðrari lóggávu"* er m.a. at tað í aðrari lóggávu, kunnu vera ásetingar, ið avmarka útflýggjan av ávísum grundardátum í serligum førum. Hetta kann t.d. vera í lóg um fólkayvirlit um ikki at útflýggja vard nøvn og bústaðir.

*Til stk. 2.*
P-talið skal ikki útflýggjast úr Virkisskránni, hvørki til almennar myndugleikar ella privat, men skal bert brúkast sum eintýðug eyðmerking av persónum innanhýsis í Virkisskránni. Tað er fólkayvirlitið sum er mynduga skráin við p-tølum, og tí skulu p-tøl útflýggjast har frá.

*Til stk. 3.*
Dagføring av persónsupplýsingum steðgar 10 ár eftir, at viðkomandi persónur gerst óvirkin. Hesi 10 ár verða roknað frá tí, at viðkomandi persónur gerst óvirkin í eindini, t.d. fer úr nevndini ella eindin fer av knóranum.

Orsøkin til at hesir upplýsingar skulu dagførast í so mong ár, er serliga fyri at kunna koma í samband við fult ábyrgdar luttakarar, eisini eftir at hesir eru givnir í eindini.

Alment innlit í hvør persónur hevur verið tilknýttur eindini heldur tó ongantíð uppat. Tað er bert dagføringin – sum vanliga helst fer fram við samkoyring millum Virkisskránna og fólkayvirlitið - sum heldur uppat eftir 10 árum.

*Til stk. 4.*
Nágreiniliga talið av starvsfólki kann vera mett sum trúnaðarupplýsing (forretningshemmelighed) hjá fyritøkum, og tí verður ásett, at grundardátur um tal av starvsfólki bert kunnu veitast til privat í støddarbólkum.

*Til stk. 5.*
Fyri at tryggja, at grundardátur úr Virkisskránni, ið ikki eru loyvdar at útflýggja til privat, ikki umvegis annan almennan stovn kortini koma í privatar hendur, verður ásett, at almennir stovnar skulu lúka somu treytir sum Virkisskráin í samband við víðarigeving av grundardátum, ið eru fingnar úr Virkisskránni.

**Til § 16**

*Til stk. 1.*
Tað verður ásett, at frámerki skal kunna setast á løgfrøðiliga eind í Virkisskránni, um at viðkomandi eind ikki skal vera partur av marknaðarføring. Ynski um slíka lýsingarvernd skal fráboðast til umsitara av Virkisskránni.

Endamálið við lýsingarvernd er, at Virkisskráin ikki skal vera orsøk til, at eindir og tilknýttir privat persónar verða dýktar undir í lýsingum.

*Til stk. 2.*
Grundardátur, ið eru móttiknar úr Virkisskránni við frámerki um lýsingarvernd, skulu ikki nýtast ella víðarigevast í stríð við ynski um lýsingarvernd.

Tað viðførir revsing við bót, sbrt. § 17, um móttakarin nýtir ella víðarigevur grundardáturnar í stríð við lýsingarverndina.

**Til § 17**

*Til stk. 1.*
Fyri at tryggja, at grundardátur heintaðir úr Virkisskránni, ikki verða nýttar í stríð við ynski um lýsingarvernd, er møguligt at sekta brot við bót.

*Til stk. 2*
Ásetingin gevur heimild til, at eisini løgfrøðiligir persónar kunnu revsast.

**Til § 18**

*Til stk. 1*
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir, nær lógin fær gildi, undir hesum at ásetingar í hesi løgtingslóg fáa ymiska gildiskomu. Orsøkin til hetta er, at sjálv KT-skipanin, sum Virkisskráin skal verða umsitin í, ikki er ment enn. Trupult er at siga neyvt, nær KT-skipanin er klár, og tí verður skotið upp, at bíðað verður við at seta lógina í gildi.

Um lógin kemur í gildi áðrenn skipanin er klár, er ikki møguligt at lúka krøvini í lógini. Tó verður tað mett sum ein fyrimunur at hava lógina klára, fyri at tryggja at politisk undirtøka er fyri at menna Virkisskránna umframt at vita hvørjir lógarkarmar koma at vera galdandi, so KT-skipanin, sum Virkisskráin verður umsitin í, verður ment samsvarandi lógarkarmunum.

*Til stk. 2*
§ 7 um heimild at heinta og útflýggja grundardátur úr skráum hjá TAKS, Skráseting Føroya og fólkayvirlitinum kemur tó í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd. Orsøkin er, at tørvur er á hesi heimild í samband við menningina av KT-skipanini handan Virkisskránna.

Fíggjarmálaráðið, 11.01.2019.

**Kristina Háfoss**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason